# Bussar fyri 20 milliónir



*Sjey nýggir Volvo-bussar til Heðin Zachariassen og Jón Thomasen, sum koyra hjá Bygdarleiðum*

*Myndir: Álvur Haraldsen*



*Jón Thomasen og Heðin Zachariassen, busseigarar, og Thomas Debes, sølumaður hjá MVH á Hjalla*

MVH - Maskinverkstaðurin á Hjalla læt leygardagin 6. desember sjey nýggjar Volvo bussar til busseigararnar Jón Thomasen í Kvívík og Heðin Zachariassen í Streymnesi

Heðin fekk fýra bussar, meðan Jón fekk tríggjar í fyrstu atløgu og fær ein afturat seinni í hesum mánaðinum. Jón Thomasen og Heðin Zachariassen koyra báðir fyri Bygdaleiðir. Bussarnir eru uppbygdir á Carrusverksmiðjuni í Finnlandi og kosta umleið 2,5 milliónir hvør. Tá Jón Thomasen hevur fingið sín buss, hava teir keypt átta bussar fyri umleið 20 millónir.

Talan er um 47 persóna Volvo 9700 bussar við 12,0 litra motori og i-shift manuellum girkassa við automatiskum girskifti. Bussarnir eru uppbygdir sum turistbussar við komforti á sera høgum støði.

MVH - Maskinverkstaðurin á Hjalla selur Volvo bussar, lastbilar umframt Volvo og Comatsu entreprenørmaskinur.

**mg**




Barnaverndarstova Føroya søkir eftir nýggjum leiðara at seta 1. januar 2009 ella seinri eftir avtalu.

UPPGÁVUR OG AVBJÓÐINGAR
Sum leiðari kemur tú at hava dagligu leiðsluna á Barnaverndarstovuni, ið er ein tænastu- og ráðgevingardepil fyri barnaverndartænasturnar í landinum.

Barnaverndarstovan umsitur fosturforeldraskipanina og nýstovnaðu SSP-skipanina, ið skal stovnseta skipað tvørfakligt samstarv í Føroyum.

Sum leiðari skalt tú m.a. arbeiða fyri menning av barnaverndarøkinum, ráðgeva landsstýrismanninum um stevnumið á økinum og eisini veita samdøgursstovnunum ráð og vegleiðing.

FØRLEIKAKRØV
Tú hevur hóskandi ástøðiliga útbúgving og hollan kunnleika til sosiala økið, kommunal viðurskifti og fyrisitingarrætt. Leiðsluroyndir ella royndir við at samskipa størri verkætlanir eru eisini ein fyrimunur.

Tú hevur virkisfýsni, dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva tvørtur um faklig mørk. Tú skalt harumframt hava teir persónligu eginleikar, at tú dugir at arbeiða saman við barnaverndartænastunum kring landið í truplum málum, eins og tú við stuðli og vegleiðing evnar at skapa samstarv, so at barnaverndararbeiðið gjøgnum felags mið og leiðreglur er í støðugari menning.

SETANARVIÐURSKIFTI
Starvið verður lønt sambært fakligum førleika og royndum.

UMSÓKNIR
Sendið umsóknir við prógvum og øðrum skjølum til

Barnaverndarstovu Føroya
R.C. Effersøes gøtu 30
100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er 18. desember 2008 kl. 15.00.**

MEIRA AT VITA?
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til:

- Annu Dam, leiðara, tlf. 51 90 82, ad@bvs.fo
- Jóan Petur Hentze, aðalskrivara KSF, tlf. 28 24 80, jph@ksf.fo
- Heðin Mortensen, formann KSF, tlf. 30 20 10, hedin@torshavn.fo
- Asbjørn Djurhuus, formann FKF, tlf. 23 51 50, asbjornd@post.olivant.fo

Sí annars meira um Barnaverndarstovu Føroya á heimasíðu okkara www.bvs.fo, har tú kanst kunna teg meira um virksemi og tiltøk stovnins.

Barnaverndarstova Føroya, R.C. Effersøes gøta 30, 100 Tórshavn, Tlf. 30 24 95, www.bvs.fo, bvs@bvs.fo.

SENDISTOVAN